# Færri og færri søkja á Læraraskúlan

**Pauli Nielsen, rektari á Føroya Læraraskúla, ásannar, at áhugin fyri at lesa til lærara og pedagog er minkaður spakuliga seinastu árini**

ÚTBÚGVING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Samlaða talið av umsøkjarum til lærara og pedagog í ár er 57 minni enn í fjør. - Ilt er at siga, hví áhugin er minkaður, men tíðirnar eru góðar, og møguleikarnir eru nógvir, vísir rektarin, Pauli Nielsen á*

Føroya Læraraskúli hevur fingið tilsamans 57 umsóknir færri í ár, enn skúlin fekk í fjør.

Pauli Nielsen, rektari, sigur, at 144 søktu inn á pedagogskúla í fjør; í summar er talið 113. Tey høvdu 87 umsóknir til lærara í fjør; í ár eru tær 61.

Hetta merkir, at samlaða talið av umsóknum til lærara og pedagog er 57 færri í ár enn í fjør.

Rektari vísir á, at fyrr í summar var líkt til, at talið av umsøkjarum fór at vera uppaftur minni, men tá ið freistin var við at renna út, komu fleiri umsóknir aftrat.

### Minkandi áhugi

– Vit mugu ásanna, at áhugin fyri at søkja á Føroya Læraraskúla at lesa til lærara og pedagog hevur verið spakuliga minkandi seinastu árini.

Pauli Nielsen sigur, at fyri einum 3-4 árum síðan høvdu tey einar 300 umsóknir tilsamans at velja ímillum – stívliga 100 ynsktu at lesa til lærara og út við 200 til pedagog.

Hann dugir ikki at siga, hvør orsøkin til minkandi áhugan er, men heldur, at hetta hevur nakað við útboðið í samfelagnum at gera.

– Tíðirnar eru góðar, og møguleikarnir eru nógvir, vísir rektarin á.

Hann sigur, at vanliga tekur Føroya Læraraskúli bert ein flokk inn av hvørjum um árið, men fyri 4 árum síðan tók skúlin tveir flokkar av læraralesandi inn.

– Tilsamans 48 næmingar byrjaðu í hesum báðum flokkunum, og av hesum hava 40 lokið læraraútbúgvingina í summar, sigur hann.

Vit skulu nógv ár aftur í tíðina, síðan tveir læraraskúlaflokkar seinast byrjaðu á Føroya Læraraskúla.

Tað tekur fýra ár at lesa til lærara og hálvt fjórða ár at lesa til pedagog.

### At granska

Pauli Nielsen, sum er 63 ára gamalur, verður ikki rektari á Føroya Læraraskúla, tá ið farið verður í skúla eftir summarfrítíðina.

Søkt hevur verið eftir nýggjum rektara, og sum skilst, hevur skúlin fingið einar sjey umsóknir til starvið.

Enn er nýggjur rektari ikki settur.

Pauli Nielsen sigur, at hann kundi hugsað sær at fingist við gransking, nú tíðin hjá honum á Føroya Læraraskúla nærkast endanum.

# Kvikk leingjast og umbyggjast

**- Við umbyggingini fær manningin nógv betri umstøður, sigur Torleif Sigurðson**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*– Leinging og umbygging fer at kosta einar 6 mió krónur, sigur reiðarin, Torleif Sigurðson*

Línuskipið Kvikk hjá Sp/f Kvikk í Klaksvík er í løtuni í Hirtshals, har skipið er longt við 6,60 metrum. Skipið hevur verið í Danmark í einar tveir mánaðir, og komandi fríggjadag verður skipið sjósett aftur. Kvikk er nú 35 metrar langur og er á støðd – og eisini í breidd - við hini línuskipini, sum vóru nakað størri.

Men Kvikk verður ikki bara longdur. Skipið verður eisini umbygt, og tað er serliga apeteringin – ella manningarumstøðurnar, ið skulu betrast munandi.

Torleif Sigurðson, reiðari, heldur tað vera neyðugt at gera nakað við skipið, nú tað ikki gongur so væl longur at fáa fólk.

– Kvikk hevur bara havt 14 koyggjur, og nú verða tvey eitt-manskømur bygd aftrat. Manningin fær eisini eitt nógv betri uppihaldsrúm, eins og umstøðurnar til umklæðing verða nógv betri.

Við umbyggingini fær skipið eisini bakka.

Torleif Sigurðsson vísir á, at teir ikki eru farnir undir hesa leinging og umbygging, tí lastin var ov lítil.

– Skipið lastaði eini 85 tons, sum undir vanligum umstøðum er nóg mikið.

Hann sigur, at tað í fyrsta lagi eru manningarviðurskiftini, sum dentur verður lagdur á at bøta um.

Ætlandi verður Kvikk liðugur í Hirtshals 8. september, og Torleif Sigurðson væntar, at leinging og umbygging fer at kosta einar 6 mió krónur.

Kvikk er fyrrverandi Saturn III. Skipið er bygt í Strandby í Danmark í 1987.

Sp/f Kvikk í Klaksvík yvirtók skipið 1. januar 2004, og sum skilst á reiðaranum, hevur tað eftir umstøðunum gingið hampiliga væl hjá skipinum.

# Gongur verri at fáa fólk

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Torleif Sigurðson sigur, at høvuðsorsøkin til, at teir hava valt at betra um umstøðurnar umborð á Kvikki, er, at ábendingar eru um, at tað gongur verri at fáa fólk.

– Eg vil ikki siga, at tað gongur illa at manna skipini, men tað eru túrar, har vit loysa við tveimum monnum færri, enn vit plagdu, og tað er ikki betri enn næstbest.

Reiðarin væntar, at so hvørt, sum møguleikarnir í samfelagnum gerast fleiri, samstundis sum fiskivinnan gongur heldur verri, hevur tað stóran týdning, at umstøðurnar umborð á skipunum verða so góðar sum gjørligt.

– Tað er sjálvandi torført at siga, men eg vænti, at tað verða tey skipini, ið hava tær bestu umstøðurnar, sum fólk fara at leita sær umborð.

Torleif Sigurðson er útgerðarmaður og rakstrarleiðari hjá tilsamans fýra skipum og bátum; Pison, Kvikki, Froya og Fiskimúla.